TILTØK

Gudstænastur sunnudagin 17. oktober
19. sunnud. eftir trinitatis
Vesturkirkjan: lestur kl. 11.00
Argja kirkja: Bergur D. Joensen kl. 11.00, altargongd
Kirkjubøur: Bergur D. Jacobsen kl. 12.30
Havnar kirkja: Sonja Klein og Bjarni Bæk kl. 11.00, altargongd, kl. 10.40 skriftamál
Nólsoy: Jóannis Fonsdal kl. 12.00
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11.00, altargongd
Klaksvíkar sjúkrahús: Elsa Funding kl. 10.00
Norðoya røktarheim: Elsa Funding kl. 14.30
Miðvágur: David Johannesen kl. 11.00
Sandavágur: Jónsvein Bech kl. 11.00, deyvagudstænasta. Talvan gongur fyri deyvameinigheitina
Mykines: Hans Jacob Joensen kl. 11.00. *Kirkjan fyllir 125 ár*
Hvalvík: Mogens Tilsted Christensen kl. 12.00
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 11.00, altargongd
Norðskála: Emil Olsen kl. 12.00, messa, skriftamál kl. 11.40
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11.00, altargongd. Talvan gongur fyri Guds orðs boðan
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 11.00
Skálavík: Jákup R. Hansen kl. 12.00, altargong
Sandvík: Ólavur Rasmussen kl. 12.00
Sumba: Patrick de Neergaard kl. 12.00, altargongd

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30: Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 verður møti, har Símin Ósá, trúboðari í Grønlandi, talar. Eingin sunndagsskúli vegna heystfrí.
www.hebron.fo

Sjómanskvinnuringurin
á Sjómansheiminum í Tórshavn kemur saman mánakvøldið 18. okt. kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Frelsunarherurin
Tórsgøta 19, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11.00: Halgunarmøti. Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Mánadagin kl. 17.00 og kl. 19.00: Skótamøti.
Í sambandi við 80 ára jubileum verður framsýning av myndum og øðrum í salinum frá týsdegi 19.okt. til fríggjadagin 22. okt. kl. 10.00–13.00 og kl. 15.00–19.00.
Leygardagin 23.okt. kl. 10.00–13.00: Kaffisøla og fiskibrunnur, har øll vinna. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudag
kl. 10.00: Breyðbróting.
kl. 12.00: Sunnudagsskúli.
kl. 18.00Ø Evangeliskt møti.
Talarar: Jørundur Hansen og Símun Ósá greiða frá um Grønlandi. Øll eru vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa í Mariukirkjuni v/ William Kenny, biskupi.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Reimund Langgaard.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 18. okt. kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Erlingi Poulsen.
Týsdagin 19. okt. kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týskvøldið 19. okt. kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantafest. Holdini hjá Hera Joensen í Vesturkirkjuni og Bergur Debes Joensen á Argjum.

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag landsbøn kl. 17.00.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Bergur Skovgaard, kl. 11.50: Sunnudagsskúli og einki ABC, kl. 16.00: Samkomufundur
Mánadagin kl. 20.00: Útfríarnarmøti v/ Peter Holmsgaard.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-fri frá 8-16.
www.filadelfia.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl 14.00: Sunnudagsskúli, vitnimøti kl. 18.00.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti. Mikumorgun kl. 07.00: Bøn.

Lívdin í Hoyvíkar skúla
Sunnudagin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Justinus Eliasen um evnið: »Hví fjalir tú teg, Gud?«
Á tilbiðjannarmøtinum kl. 12.00 talar Meta av Fløtum um evni: »Evangelisering heima við hús«
Kaffi og te verður í steðginum. Barnaansing er undir báðum møtunum.
Sunnudagsskúli verður kl. 12.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin!
www.livdin.fo

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Johann Henriksen.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Missónshúsið í Kollafirði
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli. Kl. 18.00: Møti við Egil Toftegård, menninir syngja.
Týskvøldið kl. 20.00: Møti v/ David Mandix, ferðaskrivara hjá DBI. Øll eru vælkomin.

Saron í Vestmanna
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 18.00. Jónar og Joanita Jakobsen, fyristøðupar í Kalundborg í Danmark, luttaka og greiða frá arbeiði teirra. Nátturði verður aftaná.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Vestmanna Missiónshús
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti.

Miðvágs Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli og møti kl. 18.00 í kjallaranum við luttóku frá Dansk Bibel Institut.
Vikuskiftið 23.-24.oktober verða vikuskiftismøti í samband við at salurin verður tikin í nýtslu aftur.

Norðskála kirkja
Emil Olsen, prestur, heldur fyrilestur í møtisalinum í Norðskála kirkju sunnukvøldið kl. 19.00. Evni: Enska kirkjan.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin møti kl 18.00, tey ungu skipa fyri.
Ungdómsmøtið kl 21.00.
Mikukvøldið bibliutími kl 20.00.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið verður ungdómsmøti kl. 21.00.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og kl. 18.00 verður møti.

Gøta
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12.00: Breyðbróting.
Á møtinum kl. 18.00 verður dópur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 14.00. Møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00: AWAKE.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11.00.
Vælkomin í Kelduna.

Missiónshúsið í Skopun
Ongin sunnudagsskúli sunnudagin vegna heystfrí.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn- & lovsangsløta.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania í Skopun
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Kvøldmøti.
Øll eru vælkomin.

KFUM&K, Klaksvík
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl.17.30: Bønarløta. Kl.18.00: Møti við Hjørleif Poulsen.
Kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Sunnudagin kl.13.30 er sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

Soli Deo Gloria
Leygardagurin:
kl. 10.00: Sangur og lovprísan.
kl. 15.00: Møti.
kl. 20.00: Møti.
kl. 23.00: Ungdómskvøld.
Sunnudagin:
kl. 10.00: Sangur og lovprísan.
kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
kl. 15.30: Møti.
kl. 18.00: Møti.
Telefon bønartænastan, 456514, svarar allar stevnudagarnar.

Aglow, Klaksvík
Møti verður í Soli Deo Gloria mikukvøldið 20. okt. kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Nevndin

Missiónshúsið á Viðareiði
Møti verður sunnukvøldið 17. oktober kl. 18.00 við Snorra Brend.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vitnið, Hvalba
Sunnukvøldið 17. okt. verður familjumøti kl. 18.00 við talu, sangi og eisini verður sungið saman við børnunum.
Aftaná verður nátturði í kjallaranum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna heystfrí.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Katrin Mortensen.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Bethel, Vágur
Møti verður í kvøld kl. 20.00. Poul Færø og Eyðfinn Reyðberg tala.
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting
Sunnudagin kl. 15.00: Evangeliskt møti við Poul Færø og Eyðfinn Reyðberg
Øll eru hjartaliga vælkomin!
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

Aglow, Suðuroy
Fundur verður leygarkvøldið kl. 20.00 í hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Frelsunarherurin í Vági
Leygardagin kl. 17.00: Barnamøti.
Leygarkvøldið kl. 20.00: AGLOW hevur møti.
Sunnudagin kl. 17.00: Familjumøti v/ Magnus Jensen og ødrum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti.
Mánakvøldið kl. 21.00: Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Eldrafelagið Kumlá á Skála
hevur hugnaløtu í húsum felagsins týskvøldið 19. okt. kl. 19.00. Limir kunnu tekna seg.

Kongshavnar Kvinnufelag
Dorthe Gyldenkærne heldur fyrilestur um sjálvsmenning, »Frá dunnuunga til svan«, mánakvøldið 18. okt. kl. 19.00.

Fólkaheilsuverkætlanin í Vági
Gongutúrur eftir varðagotuni av Ryskivatni til Fámjins leygardagin. Bussur fer kl. 10.00 av Kunningarstovuni í Vági (gamli skúli) norður til Ryskivatn. Gingið verður eftir varðunum. Komin til Fámjins stendur bussur fyri gongufólkunum sum koyrir til Hotel Bakkan, har fæst kaffi/te og okkurt aftur við til keyps. Tilmelding á Kunningarstovuni tel 284342 áðrenn kl. 10 leygarmorgunin. Havið heit og góð klæði, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein drekkamunn við.

Fólkaheilsuverkætlanin í Vági
Sigla og rógva í grindabátum í Vági, hvønn leygardag kl. 14.00. Tiltakið er ókeypis. Veðrið avger hvar farið verður og hvussu leingi túrurin varir. Aftaná túrin leygardagar fæst drekkamuður og okkurt gott aftur við til keyps á Hotel Bakkanum. Uppmøting á Kunningarstovuni í Vági.

Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR
Leygardagin 16. oktober verður lættur túrur til Nólsoyar, har vitjað verður Nólsoyar bygd og kirkju. Farið verður við Rituni av Bursatanga kl. 15.15 og heim aftur úr Nólsoy kl. 18.25. Tilmelding.

4. grein skótar
Aðalfundur verður 2. nov. kl. 19.30 í KFUK.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.-13.30 v/ Anne Grete Harlou, tilm. tlf. 316491
Mánadagin 18. oktober
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30–17.00: Vit hugsa um jólini
kl. 14.00–17.00: Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl

TILTØK

Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilmelding á tlf. 316491
Týsdagin 19. oktober
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: Frásøgn úr Mali. Thurid og Snorri Brend
Mikudagin 20. oktober
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00: Vitja framsýningina hjá Vígdis Sigmundardóttir í mentamálaráðnum. Tilmelding á tlf. 316491
kl. 17.00–21.00: Opið hús
Hósdagin 21. oktober
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Teldupratt
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
Fríggjadagin 22. oktober
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.
7. oktober kl. 11.00–11.45 verður hyrjanarskeið í eingilskum talumáli. Tilmelding á tlf. 316491.

Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.00-13.30
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað útriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólikaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl 13.00.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Daghilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 18. oktober:
Fimleikur v/Jóhanu Troest.
Týsdagin 19. oktober:
Vit spæla BOCCIA.
Mikudagin 20. oktober:
Fyrilestur við Varnu av Rana. Evni: Kostur til eldri.
Hósdagin 21. oktober:
Vit gera myndavevarar lidnar Rannvu Gøte.
Fríggjadagin 22. oktober:
OPIÐ HÚS.
Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Ørkin í Reykjavík
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.

Leygarkvøldið 6. nov.:
Hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15.00: Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti. Aftaná verður kaffi á Ørkini.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480.
E-mail: ek_fo@get2net.dk

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmóðrafelag.
Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Heilafelagið
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.

Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Føroyskir Mærsk Siglarar
Grønlandsvegur 58, 100 Tórshavn
Fritíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Tilmeldingarskjal fæst við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Felagið fyri Hoyribrek í Føroyum
Felagið, telur í løtuni uml. 350 limir. Fyri at gera sambandið millum limirnar og felagið lættari, heitir nevndin á limir sínar um at senda E-mail adressuna til onkran í nevndini.
Samband fæst við felagið soleiðis:
Solveig 313484 - 219584
E-mail: solveig@kallnet.fo
Katrin 313320
E-mail: finkat@kallnet.fo
Jórun 422326.
E-mail: terjo@post.olivant.fo
Felagið hevur:
E-mail adressuna:
hoyr@post.olivant.fo
Postboks 1276, FO-110 Tórshavn
Ella J. C. Svabosgøta 17, FO-100 Tórshavn

Føroya Astma/ Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 108
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr. deaf@deaf.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237. www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn · tlf. 317373

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á tlf. 313102. Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfrið Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Elspa tlf. 312424
Marita tlf. 441671

90 ára føðingardagur

Týsdagin 19. oktober fyllir Jóhannes Miðberg, Vestmanna, 90 ár.
Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Gullbrúdleyp

Sunnudagin 31.10.04 hava hjúnini Oda og Mads Hentze, Skopun, verið gift í 50 ár.
Dagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum í Havn leygardagin 30. oktober kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga beðin um at siga frá á tlf. 361502, 361065 ella 310381 innan 18. okt.

Silvurbrúdleyp

24. nov. hava hjúnini Kristina og Andras Nybo, Hósvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 20. nov kl 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, kunnu tekna seg á tlf 422435 ella 214416 til og við 7. nov.

Mikudagin 27. okt. hava Ása og Eyðálvur Holm, Porkeri, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Porkeris skúla fríggjadagin 29. okt. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða beðin um at siga frá á tlf .373939 ella 224918 áðrenn 20. okt.

40 ára føðingardagur

Fríggjadagin 22. oktober verður Jákup Berg, Sambýlið á Bárðarfløtti í Vági 40 ár.
Vælkomst verður í Stóra Pakkhúsið í Vági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Jákup við at koma, kunnu ringja í Sambýlið áðrenn 17. okt. á tlf. 374074.

Brúdleyp

Leygardagin 20. november kl. 13.00 giftast í Betesda í Klaksvík, Amalia Hansen, Klaksvík, og Ólavur M. Lamhauge, Søldarfirði. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða beðin um at ringja á tlf. 456728 ella 441168 áðrenn 10. november.
Bátur siglir úr Leirvík eftir veitsluna.

Leygardagin 20. november kl. 16.00 giftast í Vitninum í Hvalba Gunna Dimon og Jón við Neyst, bæði úr Hvalba. Veitslan verður á Hotel Øravík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða beðin um at ringja á tlf. 375189 ella 580168 áðrenn 30. oktober.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Verið tí tolnir, bróður, til Harrin kemur! Sí, bóndin bíður eftir hinum dýrabæra ávøkstinum av jørðini og væntar í tolni eftir honum, til hann fær heystregn og várregn. Verið eisini tit tolnir, styrkið hjørtu tykkara, tí at koma Harrans er í nánd«. (Ják. 5,7f)

Komið er út á heystið – ein ársins tíð, sum fyri mongum húskjum ber av øllum: Heystið sum tann ærstíðin, allar aðrar tíðir peika fram ímóti, tá koma skal til sjóndar, hvør dugur var í várinum og sumrinum – hvussu mundi hylnast við grøði og gróðri og alskins fruktum, sum Guð í vár læt spretta og næla fyri nú at búnast á heystardegi. Heystið við gleðini um, at hoyggið er komið til høldar – heystið við vónum og væntanum, nú brátt fjøllini aftur verða gtingin og skurðurin kemur fyri – tá ljós aftur verða at síggja í so mongum kjallara og úthúsi, har menn og kvinnur ganga við sveittabrot at fáa krov og avroð til høldar ella teir ógloymandi heystardagar, tá eplir og røtur verða tikin upp, tá koma skal til sjóndar, um vit fingu aftur tað, vit sáddu ella hvussu mangar ferðir hitt sádda faldaðist – ella tey, ið eldri eru, gloyma ikki tey hugnaligu heystkvøldini, tá ættarliðini plagdu at savnast um eldstað og komfýr, tá tey gomlu plagdu at siga frá, og tess skýmligari var, meira festu seg í sinnið søgur um gamlar dagar, um so mangt forborgið millum himin og jørð.

Og fara vit so í Halgubók, so møtir okkum eisini har heystið sum ein avgerandi ársins tíð, ið allar aðrar tíðir peika fram ímóti – árstíðin mikla, sum okkara vónir og væntanir eru knýttar at, tá komið er á mál, tá allar grundir eru til í takksemi at leita til hansara, ið eisini gav okkum lut í stórfingnu gávum sínum. Ja, so nær eru heyst, gróði og skurður vorðin knýtt at Guði, at øll tilveran, øll lívsins gongd úr vøggu í grøv verður sæð sum ein búnandi farleið av lívsins heysti, har tað eisini við uppr. Harra eru givnar okkum vónir um Guðs náði og miskunn, at eisini vit sum kristin menniskju mega bíða í tolni, tí okkum er givið nakað gleðiligt í væntan, nakað at líta fram ímóti við gleði og vónum, tí einaferð skal á lívsins heysti Guðs ríki koma okkum øllum til sjóndar í dýrog megi – tað ríki, allar okkara vónir og væntanir eru knýttar at – og tí mega vit ikki missa hesa vón, men heldur fara at eins og bóndin – »hann, sum bíðar eftir hinum dýrabara ávøkstrinum av jørðini og væntar í tolni«.

Martin Restorff Jacobsen, á Nesi